## Út- & Sjónvarp

**DANTAX**
DVD/CD spælari við fjarstýring til sølu fyri 500,00 kr. Er uml 1 ára gamal; sera lítið brúktur.
*Tlf. 310039 eftir kl. 19.00*

**PHILIPS**
farve tv 24" 1.500,-
*Tlf. 219868*

**ANALOG DEKODARI**
av merkinum PACE til sølu.
*Tlf. 503249*

**DIGITALUR MÓTTAKARI**
av merkinum Nokia til sølu.
*Tlf. 503249*

**28" NOKIA SJÓNVARP TIL SØLU**
100 Hz, virtual dolby surround, 3 scart stikk, VGA-stikk. Sjónvarpið er svart og er uml. 5 ára gamalt.
*Tlf. 441515/229023*

## Ymiskt

**FERÐASEÐIL TIL FØROYA**
Einvegis ferðaseðil frá Keypmannahavn til Føroya tann 29-12-2004 við Atlantsflog til sølu fyri 1000,-
*Ring 441097*

**TIL SØLU**
Pentax Digital kamera, 3.2 megapixel, 3x optisk 200 m, 128 mb ram, tasku go ekstra batteri 2.400,-
*Tlf. 219868*

**NOKIA 7210**
farveskræm, radio og headset 900,-
*Tlf. 219868*

**DYKKERFLASKE**
12L skal trykprøves 500,-
*Tlf. 219868*

**SIEMENS MC60 FARTELEFON**
til sølu fyri 1.000 kr. Einki brúkt, sum nýggj.
*Tlf. 226688*

**VINDEYGA TIL SØLU**
2 H-vindeygu 120 x 120 cm. og 4 H. vindeygu 130 x 120 cm. við termorútum bíliga til sølu.
*Tlf. 503249*

**JØRÐ Í KVÍVÍK TIL SØLU**
Fæst nøktandi boð, eru tríggir gyllin í Ognarhaganum, innan - og uttangarðs, til sølu.
*Áhugað ringið 312176/321615*

**FROSTMANNAÚTGERÐ TIL SØLU**
15 L fløska, alt uttan vestur.
*Tlf. 370077*

**TRAPPA TIL SØLU**
Trappuhol ca. 1,90 x 196, breidd 102 , hædd ca.216, høgra niður.
*Tlf. 517526*

**BORÐTENNISBORÐ**
Hevur onkur eitt borðtennisborð til sølu. Best um tað kann slást upp og rullast til síðis.
*Tlf. 421097*

**ER TÚ BANGIN FYRI AT FLÚGVA**
Sigla, fyri hæddum ella smáum rúmum, ella vit tú av við aðrar »fobiir«? Nýggja TFT-viðgerðin kann kanska hjálpa tær. Fyri Suðuroy
*Tlf. 254752*

**SPARKARI YNSKIST**
Er tað nakar, sum kann selja mær ein sparkara. Vinarliga ring
*tlf. 332190*

**BYRSA**
Cal. 12 side by side »aclett« við Ejector í góðum standi, til sølu fyri ca. 1.800 kr.
*Tlf. 266506/316312*

**HANDILSDISKUR**
ynskist.
*Tlf. 225785*

**PENGAKASSI**
ynskist til keyps.
*Tlf. 225785*

**TIL SØLU**
Brúktur oljutangi í góðum standi, hevur staðið inni, tekur 1200 l. Prísur kr. 1.000,00.
*Tlf. 319412/272805*

**TRÁÐLEYS BREIÐBAND**
Er títt tráðleysa breiðband trygt ella nýtur grannin gott av tí eisini? Vit kunnu tryggja tað.
*NetCom tlf. 505025/505026*

**VAKSTRARHÚS TIL SØLU**
Húsið er 1200 fermetrar. Áhugað kunnu venda sær til
*Tlf. 211853*

**TIL SØLU**
Fjarstýrt modelflogfar og fjarstýrdur bátur og bilur til sølu. Tveir motorar til modelflogfar fylgja við og tvær kompl. fjarstýringar. Bíliga til sølu.
*Tlf. 267656*

**YNSKIST**
Tvey góð vindeygu b. 80, l. 110, ynskjast bíliga.
*Tlf. 253211*

**PARABOL TIL SØLU**
Parabol við móttakara bíliga til sølu.
*Tlf. 583388*

**YMIST TIL SØLU**
Solarium (24 rør) 2.000,- Flymro 330 plenuklippari 800,- Hornaeimhetta við motor 1.000,-
*Tlf. 421789*

i
Sosialurin

## VIÐMERKINGAR

# Enn einaferð spyrji eg Búskaparráðið?

**Marjus Dam,**
*løgtingsmaður*



Fyri nøkrum árum síðani varð ríkisveitingin eftir einari nátt skerd við nærum 400 milliónum árliga. Ongin útrokning um møguligar búskaparligar avleiðingar vórðu gjørdar.

Tað undraði ikki sørt, tí tá undirritaði legði fram uppskot um at avtaka avgjaldið av hvítavørum, so úttalaði Landabankastjórin seg greitt ímóti at avtaka avgjaldið, tí tað kom at upphita føroyska búskapin (talan var um 10-12 milliónir).

Hvussu kann ein skerjing uppá 400 milliónir krónur í reinari inntøku kunna fara aftur við borðinum uttan nakra viðmerking frá búskaparligu stovnum okkara?

Hvussu kundi tað bera til? Men tað gjørdi tað so. Karsten Hansen hevði ikki politiskan áhuga í at upplýsa um hesi viðurskiftir, og helst heldur ikki áhuga í at hoyra nakað um avleiðingarnar.

Eg havi í Løgtinginum, í nevnd, eins og í bløðunum sett fyrispurning til nú fráfarandi formannin í Búskaparráðnum Herman Oskarsson, um hvørjar avleiðingar tað fekk fyri tað føroyska samfelagið, at ríkisveitingin minkaði við 366,4 milliónum krónum árliga. Umframt at prístalsreguleringin varð fastfryst.

Fleiri ár eru farin. Onki svar. Ein tigandi tøgn. Landsbankin hevur higartil heldur onki havt at siga um hesi viðurskiftir!

Ein skuldi trúð, at tað hevði stóran áhuga, serliga hjá einum búskaparráði, at lýst hvørji árin møguliga komu at vera eftir eina slíka skerjing, bæði um fiskaprísir vóru høgir, ella um teir vóru lágir, um alivinna gekk væl, ella ikki.

Men higatil hava vit onki svar fingið.

Skjótt fráfarandi formaðurin í búskaparáðnum fær spurningin enn einaferð. Alt búskaparráðið fær somuleiðis spurningin, Landsbankin og stjórin fáa eisini spurningin.

Nú er so mikið fráliðið, at tíðin helst er farin frá at gera eina meting. Heldur er rímiligt at gera eina eftirmeting av avleiðingunum av at skerja ríkisveitingina. Hvar høvdu vit verið búskaparliga um ríkisveitingin ikki var skerd. Í mun til at hon er skerd.

Eg haldi, at tað er ein áhugaverdur spurningur at svara uppá búskaparliga.

Um eg var alment settur búskaparfrøðingur trúgvi eg, at ein hevði havt arbeitt og svarað spurninginum, langt áðrenn hann var settur. Men hví onki svar fæst upp á hendan spurning undra eg eins og fleiri onnur seg sera nógv yvir. Hava tit sum »óheftir stovnar« fingið munnkurv? Ella er spurningurin fullkomuliga óviðkomandi, sæð frá einum búskaparligum sjónarmiði?

Hevði nakað undirskot verið á fíggjarlógini, um ríkisveitingin ikki var skerd, og fíggjarpolitikkurin annars varð førdur skilagott?

Sera áhugavert at fingið svar uppá.

Um føroyskir búskaparsstovnar ikki vilja svara, so haldi eg, at rímiligt hevði verið at spurt stovnar aðrar staðir nevndu spurningar. Tí svarast kunnu hesir spurningar - og teir skulu svarast!

# Stríð Jesusar fyri teg og meg

### – ein heilsan til John og Heina

**Jenis av Rana**



Tit trúgva á Gud - trúgvi á Meg við. Hetta bað Jesus lærisveinar sínar, beint áðrenn stríð og bardagi Hansara byrjaðu á Golgata. Bardagi og stríð Hansar fyri teg og meg, stríðið, sum at enda kostaði Honum lívið! Ikki tí hann hevði gjørt minsta skeivleikan, nei, órættur varð ikki funnin hjá honum.

Tóat hann var eins og Gud, gjørdi Hann ikki krav uppá Guddómleika sín, men valdi at gerast menniskjum líkur. Og Hann fór strævnu leiðina til Golgata, alla tíðina vitandi um, hvør endin fór at verða.

Hóast hann gekk um og gjørdi væl, royndu tey at myrða Hann, men miðvísur gekk Hann leið tína og mína.

Í Getsemane var angistin so svár, at hann sveittaði blóð, men tó helt hann á í stríði sínum- fyri teg og meg.

Tey háðaðu og spottaðu Hann á vegnum niðan Golgata, spýttu og bardu hann av, men onki fekk forða fótafetum Hansara á ferðini at bjarga tær og mær.

Við snildum royndu teir at lokka hann niður av Krossinum, men kærleiki hansara var størri. Einglar í tíggjutúsundatali stóðu alspentir tilreiðar at koma Honum til hjálpar, men neyðarróp hoyrdu teir einki. Ístaðin skakaðist søgan av rópinum: tað er fullgjørt- rópið, sum boðaði frælsi til milliónir av monnum og kvinnum, sum, heldur enn at stríðast móti Honum, hava boygt seg í undran og takksemi fyri Honum.

Gott at Hann valdi at stríðast fyri okkum, stríðið, sum ongin okra hevur minsta møguleikan at vinna.

## Fransákeldan

*Eitt livandi kelduvað ið ikki tornar*
*eg leggist á knæ fái mær í løgva*
*av tí trystallklára vatni ið svalandi er*
*sløkkir tosta gevur lív og heilsubót.*

*Fari framm við brúsandi ánni*
*komin oman á niðasta hamar*
*har Sálarbótará rennur móti Altarinum*
*standi á bakka har fossurin fellur á Altarhellu.*

*Prædikustólurin steinur nevndur*
*leysur av sjóvarmála*
*eins og varðtekin stendur*
*móti Nólsoyarfirði vendir.*

*Úti á víðum havi seglskip*
*í vindloysi rekur mót landi*
*vatnið gongur undan, verður tikið av streymi*
*vestfalli dregur mót Argjalandi.*

*Nú kom gleðisróp í lat akker falla*
*teir síggja fossin falla niður á hellu*
*søgnin sigur at fransar drógu vatn frá Fransá*
*tá takkaðu teir Guði fyri lívsins vatn.*

**Viggo Olsen**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!